# Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 29. desember 2008 hevur samtykt broyting í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaða broytinin er, at ovasti parturin, niðan ímóti grótgarðinum, av ognunum matr. nr. 156a, 166 og 168a, vestanfyri Hagagøtu á Argjum, verður broytt frá 4. gr. til A1 sethúsøki .

Broytingin fevnir um partar av matr. nr. 156a, 166 og 168a, Argir.

Tilfar, sum lýsir ætlaðu broytingina liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum frá 19. januar til og við 9. februar 2009, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða send Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 19. apríl 2009.

**Tórshavnar kommuna**




## BMI-eftirlit 3. hvørja viku

**Í skúlanum í Runavík 1. ferð mánadagin 19. jan. kl. 19-21**
**Hjá »My Dream« í Miðvági 1. ferð týsdagin 20. jan. kl. 19-21**

**Tilmelding:**
Jana: .......... tlf. 517100 (Runavík og Miðvágur)
Eileen: ........ tlf. 50 77 33 (Runavík)

**Kostnaður: kr. 50,-**



LR HEALTH & BEAUTY SYSTEMS

**sí www.lr.fo**

Lesið Sosialin -so eru tit við!

# STARV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sjúkrarøktarfrøðingur til Barnadeildina B5

Á B5 er eitt starv í skiftandi vaktum á starvsbrøki 0,8 leyst at søkja til setan 1. februar 2009 ella eftir avtalu. Møguleiki er fyri lægri brøki.

Barnadeildin hevur pláss fyri 7 børnum í aldrinum 0 – 14 ár.

Deildin er nýumvæld og hevur barna-ambulatorium.

Deildin er byrjað við THS (Talgild Heilsu Skipan).

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum**
- røkt og viðgerð til børn í aldrinum 0 - 14 ár

**Vit kunnu bjóða**
- innleiðslu
- positivt tvørfakligt samstarv
- fakliga kompotentar og virknar starvsfelagar
- fjølbroyttar arbeiðsuppgávur við nógvum avbjóðingum

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni
- fakligan áhuga innan røkt og viðgerð av børnum

Nærri fæst at vita frá Tove Thomsen, deildarleiðara, tlf. 304500, lokal 6055, lstovth@ls.fo ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, lsasapo@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 30. januar 2009 kl.12.00.**

## Erogterapeutur til Psykiatriska Depilin

Til okkara toymi av positivum og ágrýtnum ergoterapeutum í Ergoterapiin á Psykiatriska Deplinum søkja vit eftir avloysara til setan 1. apríl 2009 fram til 1. februar 2010, 34 tímar um vikuna.

Vit bjóða tær eitt arbeiðspláss í stórari menning, har tú fært møguleika fyri fakligum og persónligum avbjóðingum.

**Um arbeiðið:**
Ergoterapiin á Psykiatrisku deild viðger innlagdar og ambulantar brúkarar. Vit arbeiða sentralt í ergoterapiini og veita tænastu til ymisk toymir á Psykiatriska Deplinum.

Talan er um eitt spennandi starv við sera fjølbroyttum arbeiðsuppgávum og arbeitt verður miðvíst at menna skjalprógvan. Vit nýta m.a. tað kanadiska modellið sum fatanargrundarlag.

Ergoterapiin hevur fasta avtalu um at hava ergoterapeutlesandi frá ergoterapeutskúlanum í Esbjerg í praktik.

**Ergoterapeuturin:**
Skal hava áræði, vera sjálvstøðugur, vera opin fyri nýggjum tiltøkum og vera við til at útbyggja tað tvørfakliga samstarvið. Vit leggja harafturat dent á persónligir eginleikar sum fleksibilitet, greiða talu og humor.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja 304500 til:
Marionnu Vang Simonsen, deildarergoterapeut, lokal 5785 og 5786, lsmarso@ls.fo
Turið Jacobsen, leiðandi ergoterapeut, lokal 5781, lsturja@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 2. februar 2009 kl. 12.00.**

## Onnur leys størv á Landssjúkrahúsinum
(sí meira á www.lsh.fo)

**Sjúkrarøktarfrøðingar til G4**
Umsóknarfreistin er 23. januar 2009 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur til B7**
Umsóknarfreistin er 26. januar 2009 kl. 12.00

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn
ella við telduposti til umsokn@ls.fo



**Á Landssjúkrahúsinum**
- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo